

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 01 - 2012

# Total-stjórin - -Stúrið ikki fyri oljuprísinum

Tann politiski spenningurin, sum er íkomin millum Iran og Vesturheimin, fer ikki at hava stórvegis ávirkan á oljuprísin á altjóða marknaðinum. Tað segði forstjórin í franska oljufelagnum Total, Christophe de Margerie, á teirri árligu búskaparráðstevnuni í sveisiska býnum Davos í dag. Hann segði seg samstundis vera sannførdan um, at iranar fara ikki at steingja Hormuz-sundið, tí tað tænir ikki teirra búskapi. -Ósemjan um Iran er ikki nakað, sum er nýliga íkomið, og eg dugi ikki at síggja nakra orsøk til, at okkara brúkarar og samstarvsfeløg skulu stúra ov nógv fyri oljuprísinum, segði Total-stjórin við franska sjónvarpið BFM Business. ES samtykti fyrr í vikuni at steðga øllum oljukeypi úr Iran frá 1. juli, og iranska tjóðartingið viðger nú eitt uppskot um at svara aftur við at banna øllum útflutningi til Evropa beinanvegin. Iran er tað næststørsta oljuframleiðaralandið í heiminum. Kina er teirra størsti keypari, og í Evropa eru tað serliga Spania, Italia og Grikkaland, sum keypa iranska olju. Altjóða Gjaldoyragrunnurin, IMF, hevur sagt, at gera iranar álvara av at steingja Hormuz-sundið, kann oljuprísurin hækka einar 30 dollarar fyri tunnuna. Men Total-stjórin væntar ikki, at iranar fara at gera álvara av hóttanini. -Eg dugi ikki at síggja, hvussu teir kunnu steingja sundið, tí teirra egnu skip mugu sleppa at sigla tann vegin, sigur Christophe de Margerie í Davos.